

## Davia vann ferð til Lalandia

Vinnarin av SMS kappingini hjá 62ºN travel er funnin. Vinnarin bleiv Davia G. Petersen, sum her fær handað sítt gávubræv frá starvsfólki frá 62ºN travel. Davia var sum vera man sera fegin um at hava vunnið, somuleiðis børnini Arndis og Malena sum eisini síggjast á myndini. Vinningurin er ein ferð fyri tvey vaksin og tvey børn við Norrønu og uppihald á Lalandia í Billund ella Rødby. Davia hevur longu bílagt sær ferðina, og fara tey øll fýra avstað við Norrønu 5. juni til Lalandia í Billund. Í SMS kappingini hjá 62ºN travel fyri apríl mánaði ber til at vinna eina ferð til Íslands fyri tvey vaksin og tvey børn við gisting og útferðum, sí meira á www.62n.fo

# Framvegis eingin til-búgving

**Landið hevur framvegis onga tilbúgving innan dálking á havinum. Útgerð, samskipan og venjing manglar framvegis, sigur Pauli Einarsson um dálkingina í Nólsoyarfirði**

DÁLKING
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

- Vit hava onga tilbúgving, so einfalt er tað. Tað varð tosað nógv um manglandi tilbúgvingina, tá Olshana sakk, men einki er gjørt síðan. Úrslitið er, at útgerðin er niðurslitin, vit hava framvegis onga samskipan innan tilbúgving, og eingin tekur ábyrgd fyri dálkanina, sigur Pauli Einarsson.

Pauli Einarsson eigur og rekur privata virkið OSR, ið fæst við tilbúgving í samband við dálking á havinum.

- Fleiri uppskot eru løgd fram fyri landsstýrisfólkini í innlendismálum, um hvat kann gerast á økinum, men einki hendir. Eg havi eisini bjóðað meg fram, bæði sum partur av arbeiðnum og sum samskipari, uttan at hoyra nakað, sigur hann.

Pauli Einarsson sigur, at landið má taka avgerð um hvat tað vil við tilbúgvingini á sjónum.

- Er tilbúgvingin ein útreiðsla ella ein íløga? Vil mann yvirhøvur verja náttúruna? Spyrt tú meg, manglar samskipan, útgerð og venjing innan tilbúgving í Føroyum, sigur Pauli Einarsson.



*Pauli Einarsson hevur seinastu árini arbeitt við eini tilbúgvingarætlan, sum hann hevur lagt fram fyri myndugleikarnir. Men enn er einki hent á økinum*

*Savnsmynd*



*Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu finst harðliga at Innlendismálaráðnum, sum hevur sovið í tímanum, tá tað kemur til tilbúgving á sjónum. Landið hevur framvegis onga tilbúgving, nú olja aftur lekur í Nólsoyarfirði*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Støðan er ein skandala

**Borgarstjórin í Havn finst harðliga at landsins myndugleikum, ið hava forsømt at koma við neyðugu kunngerðini, sum tilskilar hvat skal gerast, tá olja í stórum mongdum lekur á sjógv. Einki minni enn ein skandala, heldur borgarstjórin**

DÁLKING
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

- Hetta er ein landsuppgáva, tað skal eg gera greitt beinanvegin. Vit skulu nokk hjálpa til við uppruddingini, men tað verður uppá rokning, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn.

Aftur hesa ferð gekk oljudálkingin út yvir Havnina. Tað er harmiligt, og serstakliga óheppið, at umhvørvislógin ikki virkar sum hon skal í slíkum støðum.

- Trupulleikin við umhvørvislógini er, at kunngerðin ongantíð er lýst. Er kunngerðin ikki lýst, ber ikki til at siga hvør revsing skal nýtast í hvørjum føri. Tað er ein skandala. Nú má Innlendismálaráðið taka seg saman, sigur Heðin Mortensen.

Hann sigur, at kommunurnar hava rykt ferð eftir ferð eftir kunngerðini hjá Innlendismálaráðnum, men at eingin kunngerð kemur.

- Hetta má halda uppat, tí hetta er so mikið álvarsligt, og má takast í størsta álvara.

### Olshana umaftur

Oljan, sum í gjárkvøldið lak út á Nólsoyarfjørð, er tungolja. Enn er óvist hvussu nógva olju, talan er um.

- Men givið er, at tungoljan fer at leggjast so tjúkk sum havragreytur framvið strendurnar, og at tað fer at taka mánaðir at fáa alla oljuna upp, sigur borgarstjórin.

Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu er í øðini inn á, at sama vanlukka hendir tvær ferðir.

- Hetta er júst tað sama, sum hendi tá Olshana rendi á Flesjarnar, og vit hava akkurát einki lært frá tí vanlukkuni. Tað finst framvegis eingin landsútgerð. Og her skal talast harðliga at, sigur hann.

Hann heldur eisini, at eftirlitið við skipum er ikki nóg gott í Føroyum.

- Aðra staðni er krav at loðsur skal umborð, tá skip koma í havn. Hví ger mann ikki tað her eisini, spyr Heðin Mortensen.

Hann skýtir upp møguleikan hjá landsstýriskvinnuni í innlendismálum at leggja økið út til kommunurnar. Á tann hátt er lættari at halda skil skipum, ið koma inn á Havnina. Havnameistarin, sum heldur skil hvørt skip kemur inn, hevur í løtuni onga heimild í tílíkum førum.

- Nú má handlast. Vit eru sera skuffað av landsins myndugleikum, at teir ikki hava fingið hesi viðurskiftini uppá pláss, og tað er ein skandala, sigur borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Heðin Mortensen.